BÚSKAPARRÁÐIÐ

# 2023

# Samanumtøka av ráðstevnu um tilfeingisgjøld í mars 2023 í Løkshøll

August 2023

# Búskaparráðið

## Inngangur

Búskaparráðið skipaði í mars 2023 fyri eini ráðstevnu um tilfeingisrentu og tilfeingisgjøld í føroysku fiski- og alivinnuni. Ráðstevnan bleiv skipað í tveimum pørtum einum har alivinnan bleiv lýst og einum parti har har fiskivinnan.

Í nógv ár hevur kjak verið um tilfeingisrentu og uppkrevjingina av hesi til felagskassan við eitt nú tilfeingisgjøldum og tøkugjøldum. Semja er um eitt tilfeingisgjald, men longri enn hetta røkkur semjan ikki. Harav hava vit skiftandi karmar fyri vinnuna, og skiftandi karmar kunna ávirka neiliga íløgurnar hjá vinnuni, sum aftur kann minka um vøksturin í búskapinum.

Ætlanin við ráðstevnuni var at varpa búskaparfakligt ljós á skipanir, ið uppkrevja tilfeingisrentu til felagskassan í Føroyum, bæði tá tað kemur til tilfeingisgjøld frá fiskivinnuni og tøkugjøld frá alivinnuni. Umboð úr Noregi og Íslandi greiddu frá ymiskum skipanum og komu við fakligum boðum uppá, hvussu skipanir kunnu setast saman. Umframt framløgur frá serfrøðingum var eisini eitt ávíst kjak, har fyrimunir og vansar við ymisku skipanunum vórðu lýstar, hartil komu nøkur boð uppá, hvussu skipanirnar kunna betrast. Viðmerkingar komu eisini frá lurtarunum í salinum.

Yvirskipaða endamálið við tiltakinum var samfelagsbúskaparligur effektivitetur og varandi burðardyggur vøkstur í búskapinum.

Í hesum skjali er ein samanumtøka av sjónarmiðum førd fram á ráðstevnini.

# Skrá: Ráðstevna um tilfeingisgjald 17. mars 2023 í Løkshøll

**Orðstýrari: Høgni í Jákupsstovu**

| Klokkan | Hvat | Hvør |
|---|---|---|
| 8:30 | **Vælkomin** | Fróði Magnussen, formaður í búskaparráðnum |
| | **Alivinnan** | |
| 9:00 | Hvussu er skipanin við tilfeingsgjaldi í dag | Ragnfríð Nord Anthoniussen, fulltrúi, Umhvørvis- og vinnumálaráðið |
| 9:15 | Salmon farming around the globe - Dynamics in Production, Sales, Pricing, Earnings and Investments. | Ragnar Nystøyl, høvuðsgreinari, Kontali |
| 9:45 | Resource rent taxation in Norway (Naturressurser og skatt i Norge). | Karen Helene Ulltveit-Moe, professari í búskaparfrøði á Universitetinum í Oslo. Forkvinna fyri nýskipanarnevndini fyri tilfeingisgjald av laksaaling í Noreg. |
| 10:15 | **Steðgur** | |
| 10:30 | Profits and rents in Norwegian salmon aquaculture. | Bård Misund, professari í búskaparfrøði á Universitetinum í Stavanger |
| 11:00 | Political Risk in the Blue Economy. | Audun Wickstrand Iversen, íløgurøktari í Den Norske Bank (DNB) |
| 11:30 | Kjak, hvussu kunnu vit gera gjaldsskipanina í alivinnuni betri? | Karen Helene Ulltveit-Moe, Bård Misund, Høgni Dahl Jakobsen, fíggjarstjóri, Bakkafrost |
| 12:10 | Samanumtøka alivinnan. | Johnny í Grótinum, limur í búskaparráðnum |
| 12:15 | **Døgurði** | |
| | | |
| | **Fiskivinnan** | |
| 13:15 | Hvussu er skipanin við tilfeingisgjaldi í dag. | Djóni Højgaard, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið |
| 13:35 | Demersal and pelagic fisheries in Norway - some issues. | Ola Flåten, professari í tilfeingsbúskapi, emeritus á Universitetinum í Tromsø (Arctic University of Norway) |
| 14:15 | **Steðgur** | |
| 14:30 | Taxing the fisheries; Experience from Iceland. | Birgir Tór Runólfson, dosentur, University of Iceland |
| 15:10 | Kjak, hvussu kunnu vit gera gjaldsskipanina í fiskivinnuni betri? | Ola Flåten og Birgir Tór Runólfson |
| 15:45 | Samanumtøka – fiskivinnan. | Johnny í Grótinum, limur í búskaparráðnum |
| 16:00 | **Endi** | Fróði Magnussen, formaður í búskaparráðnum |

# Indhold

Inngangur.......... 2

Skrá: Ráðstevna um tilfeingisgjald 17. mars 2023 í Løkshøll.......... 3

Birgir Tór Runólfson, dosentur, University of Iceland.......... 3

Ola Flåten og Birgir Tór Runólfson.......... 3

Samanumtøka – Ragnar Nystøyl (RN).......... 5

Samanumtøka – Karen Helene Ulltveit-Moe (KHUM).......... 5

Samanumtøka - Bård Misund (BM).......... 7

Samanumtøka – Audun Wickstrand Iversen (AWI).......... 7

Samanumtøka – Ola Flåten (OF).......... 8

Samanumtøka – Birgir Thór Runólfsson (BTR).......... 9

Útgangur.......... 11

## Samanumtøka – Ragnar Nystøyl (RN)

Seinastu árini hava verið sermerkt fyri laksaídnaðin – ikki minst 2022, ið var merkt av stórum prísvøkstri á alifiski. Hóast stóri prísvøksturin undanfarna ár hevur havt eina jaliga ávirkan á lønsemi hjá vinnuni, er framleiðslukostnaðurin eisini merktur av prísvøkstri. Serliga kann nevnast kostnaðurin av fóðri, ið er øktur við áleið 20-25% frá 2021-2023.

Hóast framleiðslan í Føroyum er væl minni enn í størstu framleiðslulondunum, Noreg og Kili, hevur vøksturin í framleiddari mongd verið væl størri sammett við Noreg seinastu 20 árini (árligur vøkstur á 10% í Føroyum í mun til 7% í Noreg í tíðarskeiðinum frá 1995-2022).

RN leggur dent á, at sammet við kappingarneytarnar er føroyska alivinnan í serklassa – hendan støða er íkomin bæði av umhvørvisligu fortreytunum og dugnasemi hjá føroysku fyritøkunum. Her kunnu nevnast betri gagnnýtsla av fóðri, hægri sláturvekt og minni felli. Eisini er gagnnýtslan av smolti góð. RN vísir á, at føroysku smoltini í miðal eru tvífalt so stór sum í Noreg og Íslandi. Fyrimunurin við hesum er, at laksurin hevur eina væl styttri eksponeringstíð í firðinum, ið er við at minka um lívfrøðiligu avbjóðingarnar sum til dømis laksalús og sjúku. Somuleiðis er kiloprísurin fyri heilan føroyskan alilaks tann hægsti í heiminum, áleið 1 Euro hægri enn heilur norskur alilaksur.

Hetta merkir eisini at lønsemi í føroyskum alibrúki er hægri enn í øðrum alibrúkum. RN metir, at føroysku alifyritøkurnar hava dugað væl at skipað sínar íløgur, umframt at fyritøkurnar hava verið dugnaligar at útnytta nissjumarknaðir. Hann metir, at vælskipaða stýringin hjá myndugleikunum av føroysku alivinnuni hevur havt sína ávirkan.

Hóast stórt lønsemi hevur verið í alivirksemi seinastu árini, er framtíðin merkt av avbjóðingum. Fortreytirnar fyri meirframleiðslu í londunum í Norðuratlantshavinum eru lutfalsliga góðar. Tó so eru royndirnar í Noreg, at meðan árligi vøksturin í framleiðslu seinastu 10 árini hevur verið um 5%, eru íløgurnar fyri hvørt framleidda kilo øktar við 13% í miðal.

RN ásannar, at meðan føroyingar fylgja við í gongdini við tilfeingisskatting í Noreg, er eisini ein norskur áhugi fyri føroysku skipanini við tøkugjaldi. Skipanin í Føroyum er helst lættari at stýra, men tað kann vera óheppið at hava eina umsetningsgrundaða skipan. Skal ein umsetningsgrundað skipan rigga sum ætlað, metir RN, at tað er neyðugt at brúka eitt annað grundarlag enn spotprís. Hetta kemst av, at spotprísurin tekur støði í kiloprísi fyri heilan laks, meðan útlit eru fyri framhaldandi vøkstri í framleiðslu av laksaportiónum, ið ikki neyðturviliga fylgja hesum spotprísi. RN vísir á, at norska skipanin, ið er yvirskotsgrundað, hevur sínar fyrimunir, millum annað tí at normprísseting ikki verður neyðug.

RN mælir til varsemi, tá ið nýggj skipan skal setast í verk í Føroyum. Her vísir hann millum annað á lívfrøðiligu avbjóðingarnar, ið gerast alsamt størri og at størri inntriv í vinnuna kunnu vera íløgutálmandi. Hetta kann hava avleiðingar í verandi støðu, har minni rúm er fyri øktari framleiðslu, tá ið bestu møguleikar fyri framleiðslu eru troyttir. Hóast laksaaling er ein ídnaður, ið er tengdur at geografiskum fortreytum sum er, eru somuleiðis útlit fyri vøkstri í off-shore aling og aling á landi, og útlit eru fyri at siðbundna framleiðslan fær størri kapping. Ov stór inntriv kunnu tí hava árin á leiklutin hjá føroysku alifyrtøkunum sum avriksførandi.

Samanumtikið metir RN, at hóast laksaaling er ein ídnaður, ið er førur fyri at gjalda meiri til felagskassan enn tað, ið hevur verið goldið undanfarnu árini, noyðast vit at hava í huga teir váðar, ið liggja fyri framman.

## Samanumtøka – Karen Helene Ulltveit-Moe (KHUM)

Eins og í Føroyum hevur alivinnan fingið ein alsamt størri týdning í Noreg, og er farin frá at vera ein smáídnaður til eina milliardavinnu. Harafturat hevur alivinnan umskipað seg frá at hava eina rúgvu av smáum aktørum til færri, stórar aktørar. Hendan konsolidering er sjónlig, og í dag verða áleið helvtin av øllum aliloyvinum í Noreg umsitin av 4 stórum aktørum.

Lønsemið í norskum alibrúki hevur verið í stórari framgongd síðani aldaskiftið, og hetta sæst aftur í kapitalavkastinum í alibrúki, ið er 3 til 4 ferðir so stórt sum í øðrum vinnugreinum í Noreg í dag. KHUM meinar, at økta lønsemið er íkomið vegna  ókeypis atgongd til nýtslu av firðinum, ið eru at meta sum náttúrutilfeingi. Tí er ein stór tilfeingisrenta í alivinnuni.

Hóast havorku- og oljuvinnan, ið somuleiðis eru at meta sum tifeingisvinnur, hava havt virknar og støðugar skipanir í áratíggju, er framvegis eingin yvirskipað skipan sett í verk fyri norsku alivinnuna. KHUM vísir tó á, at tilfeingisrentan í ali- og havorkuvinnu hava verið sambæriligar í tíðarskeiðum, har ið havorkuvinna hevur verið skattað, meðan alivinnan ikki hevur rindað serskatt til felagskassarnar.

Arbeiðið í nevndini, sum hevði til endamáls at koma við uppskoti til nýskipan innan norsku alivinnu, ið KHUM sat sum forkvinna fyri, hevur verið merkt av stórari mótstøðu frá vinnuni. Hon vísir tó á, at hetta eisini gjørdi seg galdandi, tá ið farið var undir miðvíst arbeiði at gera eina skipan við tilfeingisgjaldi í oljuvinnuni miðskeiðis í 70'unum. Tá hóttu oljufyritøkur í Noreg millum annað við, at varð serskattur álagdur oljuvinnuna, fór tað at hava afturvirkandi árin og merkja ein væntandi íløguáhuga. Hendan skipan hevur tó víst seg at virkað fyrimyndarliga væl.

Í 2000 var eitt veiðugjald sett á alibrúk, men KHUM metir, at hetta kann kallast eitt súmbolskt gjald heldur enn ein reellur tilfeingisskattur. Síðani 2018 hava nýggju aliloyvini verið seld á uppboðssølu. Hóast hetta er eitt gott útgangsstøði, metir KHUM, at ein skipan við loyvum á uppboðssølu einans kann nýtast at fáa tilfeingisrentu inn frá nýggju aliloyvunum. Tí er neyðugt við eini skipan, ið eisini tekur hædd fyri varandi aliloyvum, tí hóast keyp og søla av hesum aliloyvum er farin fram undir konsolideringini av alivinnuni, hava felagskassarnir ikki fingið sín part. KHUM metir, at alarar hava notið gott av, at teir einki hava goldið hesi 20 árini eftir at hava keypt hesi loyvi, og at tað tískil er rættvíst at teir í framtíðini gjalda sín part.

KHUM metir, at ein yvirskotsgrundað skipan hevði verið mest gagnlig fyri bæði vinnu og búskapin sum heild – hetta kemst av, at tilfeingisvinnur eru ógvuliga óstøðugar, og at ein yvirskotsgrundað skipan tryggjar, at tilfeingisgjald ikki kann elva til, at yvirskot gerst til undirskot. Hetta kann henda við eini skipan eins og henni, vit hava í Føroyum, har eitt kilogjald verður sett á framleiðsluna.

KHUM staðfestir, at tað er alneyðugt, at ein serskattaskipan tryggjar, at íløguáhugur hjá vinnuni ikki verður ávirkaður. Somuleiðis er neyðugt, at serskattur einans verður rindaður av framleiðslu á havi (náttúrutilfeingi), og ikki ávirkar frameliðslu á landi (smolt). Besta loysnin til at taka hædd fyri hesum er at áseta framleiðslu á havi við einum normprísi – einum ásettum virðið, ið myndugleikarnir kunnu nýta sum útgangsstøði at skatta við tilfeingisskatti. Neyðugt er eisini, at ein slík skipan er vælgrundað og gjøgnumhugsað, tí ein normprísur fer altíð at vera ávirkaður av ivasemi.

Nýskipanarnevndin hevði eitt uppskot á ein serskatt á 40%, ið skuldi leggjast afturat partafelagsskattinum, men KHUM staðfestir, at hendan støddarmeting heldur er vegleiðandi enn fastlæst. Hon metir tó eisini, at við eini slíkari skipan verður nógv tikið inn í góðum tíðum, og vinnan kann, um tað gongur illa í eitt tíðarskeið, fáa eitt endurgjaldskrav mótvegis landinum.

Heldur enn at fylgja uppskotinum um ein øktan partafelagsskatt, valdi táverandi stjórn at áseta eitt kilogjald á uml. 0,5 NOK/kilo. Hetta merkir, at tilfeingisgjaldið í alivinnuni í Noregi er áleið 500 mió. NOK, meðan KHUM metir, at uppskotið hjá nýskipanarnevndini hevði viðført eina skattainntøku á nærri 7 mia. NOK.

## Samanumtøka - Bård Misund (BM)

Hóast stórt lønsemi í norskari alivinnu seinastu árini, hevur hetta ikki altíð verið støðan. Alivinnan í Noreg hevur meiri enn hálvthundrað ár á baki, og seinastu nógvu áratíggjuni hevur lítið og einki lønsemi verið. Ikki fyrr enn seinastu 10-15 árini hevur óvanligt lønsemi verið at hóma í norskari alivinnu.

BM vísir á, at búskaparfrøðin ikki er einræddað í málinum um tilfeingisrentu í alivinnu. Hóast tað møguliga er ein sannroynd, at náttúrutilfeingi avmarkar talið av alibrúkum, vísir BM á, at tað í síðsta enda eru mynduleikarnir, ið avmarka talið av alibrúkum og harvið avmarka framleiðsluna av alilaksi. Tískil kundi talan verið um eina regulatiónsrentu heldur enn tilfeingisrent í alibrúki. Hann viðurkennir tó, at regulatiónsrenta, eins og tilfeingisrenta, kundi verið skattað, um hon er skipað við avmarkaðari tilgongd.

BM vísir á, at stór ósemja er í búskaparfrøðini um óvanliga lønsemið í tilfeingisvinnum einsamalt kann tillutast tilfeingisrentu, og harvið at ástøði, at lønsemi einans skyldast øktari tilfeingisrentu ella regulatiónsrentu, av røttum kann kritiserast. Fleiri grundgevingar eru fyri, at talan kundi verið um aðra rentu enn júst tilfeingisrentu; til dømis verður ikki tikið hædd fyri dugnasemi hjá tí einkulta í alivinnuni, ið ávirkar lønsemið.

Eisini vísir hann aftur atfinningunum um, at aliloyvi í Noregi hava verið útlutað ókeypis. Einans 4-5% av teimum, ið hava fingið upprunaligu aliloyvini útvegað, eru framvegis í vinnuni í dag. Restin av aliloyvinum hava skift ognarskap, og hetta í handli av aliloyvum og/ella alifyritøku.

Tískil metir BM, at skipanir, eins og galdandi skipan í Føroyum ella tilmæli frá nýskipanarnevndini í Noreg, ikki megna at vera neutralar.

BM ásannar, at stóri prísvøksturin hevur ført til vaksandi lønsemi í alivinnuni, men hóast stórt lønsemi hevur alivinnan stórar avbjóðingar fyri framman. BM metir, at í ávísum førum eigur hædd at verða tikin fyri kostnaðum sum fylgja av umhvørvisligum átøkum og atlitum í alivinnu. Lívfrøðiligar avbjóðingarnar eru í alivinnuni, serliga orsaka av lús og sjúku. Royndir í Noreg hava millum annað víst, at miðalvektin á deyðum alilaksi er nærum tvífaldað seinastu 15 árini. Heldur hendan gongdin fram, kann hetta fáa stórar avleiðingar; ikki minst fyri lønsemið, tí tess størri alilaksurin er, tess meiri orka og kostnaður er lagdur í framleiðsluna av hesum laksi.

Krøvini til viðgerð móti laksalús eru herd seinastu 10 árini, og fari er frá kemiskum viðgerðarhættum til termiskar/mekansikar viðgerðarhættir at basa lúsatrupulleikunum. Hóast hetta hevur eydnast væl, og lúsatalið er fallið, eru hesir viðgerðarhættir nógv dýrari enn kemiska viðgerðin, ið varð nýtt áðrenn 2013. Hetta ávirkar somuleiðis lønsemið í vinnuni.

Hesir negativu eksternalitetir, ið eru íkomnir av atlitum til umhvørvi og fiskaheilsu, gera tað torført at regulera og skatta alivinnuna sum ein samlaðan bólk; hetta tí at avbjóðingarnar eru ymiskar í ymisku alibrúkunum. Tað sama kann sigast um trafikkljósskipanina, ið verður nýtt í Noreg til at regulera alibrúk, sum eigur at vera eftirmett. Heldur enn at tikið støði í alivinnuni sum heild, átti hendan skipan at tikið støði í einkulta alibrúkinum.

BM metir, at tilfeingisskatting í alivinnu er ein politiskur spurningur, men førir fram, at stóri vøksturin í alivinnuni hevur havt nógv avleitt virksemi við sær á landi, her millum annað í byggivinnuni. Hesum eiga mynduleikarnir at taka hædd fyri, tí ein og hvør serskattaskipan eigur at hava virðisøkingina á landi í huga – serliga um hendan skipan ávírkar íløguáhugan í alivinnuni.

## Samanumtøka – Audun Wickstrand Iversen (AWI)

Í alheimshøpi er havgrundað vinnuvirksemi í dag so stórt, at tað samlað sæð er hin 7 stórsti búskapurin í heiminum. Harafturat eru útlit fyri, at hesin búskapur fer at vaksa nógv í framtíðini.

Hetta er ikki einans galdandi fyri fiskivinnu og alibrúk, men eisini fyri orkuframleiðslu. Millum annað væntast off-shore vindorka at fýrfaldast fram til 2030. Harumframt er áleið 80% av øllum farmaflutningi grundaður á havið. Stórt potentiali er fyri alternativum vinnugreinum, ið ikki reiðiliga hava fótað sær enn, millum annað havgrundaður námídnaður og framleiðsla av alternativum orkuloysnum, til dømis sólorkuframleiðsla í sjóøkið.

Havgrundað proteinframleiðsla, her bæði fiski- og aliídnaðurin, er voksin munandi, og er tvífaldað síðani 1960. Tó so verður mett, at hendan framleiðsla hevur eitt stórt vakstrarpotentiali, men skulu slíkar ætlanir bera á mál, krevur hetta stórar íløgur. Júst hetta hevur áhuga fyri bæði føroysku og norsku tjóðina, har fiski- og alivinnan eru týðandi partur av samlaða búskapinum.

Stóri blái búskapurin (vinna á havi) merkir eisini, at tað er av stórum týdningi at havgrundaður ídnaður verður skipaður á ein burðardyggan hátt. Skulu verandi og komandi vinnugreinar støðast, er neyðugt at taka hædd fyri troti av náttúrutilfeingi. Hetta ger seg eisini galdandi, tá ið talan er um serskatting av hesum økjum.

Ein skipan, ið verður nýtt at lýsa avbjóðingarnar at útnytta tilfeingið á besta og mest skynsama hátt, er sokallaði ESG myndilin. ESG (Environment, Social, Governance) tekur støði í, at myndugleikar og fyritøkur hava ávísar umhvørvissligar, sosialar og stýrrisskipanarligar skyldur mótvegis fyri hvørjum øðrum, men eisini borgarum og arbeiðarum. AWI metir, at tað er allneyðugt at mynduleikarnir virða sína skyldu mótvegis vinnugeiranum, hetta við at tryggja støðugar og gjøgnumskygdar skipanir.

Til tess at fremja neyðugu íløgurnar krevst tøkur kapitalur, og tískil er kapitalurin eitt krav, um vinnulívið skal vaksa. Íleggjari hevur egin áhugamál í huga, og meðan lønsemi í sjógæti ikki átti at verið meiri torført at gjøgnumskoða enn í øðrum vinnum – hetta tí at inntøkan kann roknast í vekt og prísi – hevur ein óstøðug skipan ta ávirkan, at útlitini gerast ógreið. Hesin váði, eisini kallaður politiskur váði, kemst av, at politisk inntriv kunnu ávirka avkastprognosurnar hjá íleggjara, og hetta kann hava eina negativa ávirkan á íløguáhugan.

Sambært AWI var hetta sjón fyri søgn, tá ið norska stjórnin kunnaði tjóðina um ætlanirnar við tilfeingisskattinum í Noreg – eisini kallaður grunnrenteskatt – tí dagin eftir fall kursurin hjá ailifyritøkunum, ið eru skrásettar á virðisbrævamarknaðinum, við nærum 40%. Hóast skatturin í sær sjálvum óivað hevur sína ávirkan, eru útlit fyri, at ein stórur partur av hesum fallið kemst av tí óvissu, ið er knýtt at óvæntaða skattinum, tí hendan elvir til uppaftur meiri óvissu frameftir, um fleiri slík inntriv eru í væntu.

Hóast politiski váðin í Noreg yvirskipað er rættiliga lágur, metir AWI, at støðugir karmar fyri vinnulívinum krevja kunnleika til ætlanir hjá myndugleikunum fram í tíð. Harafturat er alneyðugt, at tær skipanir, ið eru í væntu, hava fult gjøgnumskygni.

## Samanumtøka – Ola Flåten (OF)

Eins og í Føroyum fevnir fiskivinnan í Noreg um bæði botnfiskiskap og pelagiskan fiskiskap. Fiskiskapurin í Noreg er harafturat tengdur at altjóða avtalum, har ið pelagiski fiskiskapurin verður reguleraður í altjóða samstarvi, meðan stórur partur av botnfiskiskapinum í Barentshavinum verður reguleraður í samráði við Russland. Hetta samstarv er framvegis galdandi, hóast tey altjóða átøk, ið eru framd móti Russlandi eftir hernaðarligu innrásini í Ukraina.

Pelagiski fiskiskapurin í dag er áleið á støði við fiskiskapin miðskeiðis í 1980'unum. Tó so er virði á pelagiska fiskiskapinum nærum trífaldað í tíðarskeiðinum 1985 til 2022. Í sama tíðarskeiði er botnfiskiskapurin voksin úr 700 t. tonsum upp í 1.000 t. tons, og eisini her er virði vaksið við áleið eini helvt síðani 1985. Hóast vaksandi lønsemi í fiskivinnuni, er flotin minkaður eitt vet, og tørvurin eftir arbeiðsmegi er væl lægri enn í 1980'unum, tó støðugur seinastu 20 árini.

Tíðin síðani aldaskiftið hevur verið merkt av strangari regulatión av fiskivinnu í Noreg, har ið fyrstu veiðuloyvini gjørdust lógarkrav longu í fyrru helvt av 1900'talinum. Afturat veiðiloyvum vóru ásettar afturkeypstreytir av loyvum, hetta til tess at tryggja at fiskiskapurin ikki troyttaði stovnarnar, ið longu vóru undir trýsti.

Í dag hevur Noreg eina skipan, ið verður umsitin við bólkakvotum, og síðani einstakar kvotur til fiskifør. Hesi loyvi hava avmarkaða umsetiligheit.

Fram til ár 2000 varð stuðul latin norsku fiskivinnuni. Fóru lønirnar í fiskivinnuni niður um miðallønina í sambæriligum vinnugreinum á landi, høvdu fakfeløgini eitt lønarkrav mótvegis stjórnini. Hetta merkir, at góð hagtøl fyri lønsemi í fiskivinnuni heilt aftur til 1960'ini eru tøk í Noreg.

Meðan hendan stuðulsskipan er avtikin, metir OF, at har framvegis eru ávísar fortreytir í fiskivinnuni, ið kunnu metast sum stuðul. Millum annað skulu norsku reiðaríini ikki gjalda oljuavgjøld, umframt at mynduleikarnir bera kostnaðin fyri umsiting og útvikling av fiskivinnu í Noreg. OF metir, at hendan upphædd er áljóðandi áleið 2 mia. NOK í dag. Harafturat hava tey í Noreg ein fiskimannafrádrátt, ið minnur um hann, vit kenna úr Føroyum. Verða tølini í Noreg sett inn í roknifrymlin hjá OECD fyri stuðulskipanir, merkir hetta, at árligi stuðulin til norsku fiskivinnuna er áleið 200 mió. USD – áleið 8% av árliga landingarvirðinum hjá fiskiflotanum tilsamans.

Í verandi skipan gjalda norsku reiðaríini vanligan partafelagsskatt, umframt nøkur smærri vøru- og útflutningsgjøld, meðan eingin skipan við tilfeingisgjøldum ella "cost recovery"-gjødum eru galdandi. Hóast nýskipanarnevndin í alivinnuni eisini metti, at fiskivinnan átti at verið áløgd tilfeingisskatt, varð mett, at størri fyrireikingararbeiði eigur at verða gjørt innan hetta øki, og tískil eru ikki útlit fyri serligum tilfeingisskatti í fiskivinnuni.

Sambært OF er tilfeingisrenta í norsku fiskivinnuni. Hendan kemst av, roknskaparliga yvirskotið í fiskivinnuni ikki tekur støðu til náttúrunar íkast til fiskivinnuligan aktivitet á sjógvi, og at hetta yvirnormala avkastið eigur at koma samfelagnum til góðar. Hann ásannar, at fleiri hættir eru at útrokna hesa tilfeingisrentu, og nevnir, at ein háttur er at áseta fortreytir um vanligt yvirskot og vanligar lønargjaldingar við útgangsstøði í sambæriligum kapital- og arbeiðsintensivum vinnugreinum á landi.

Sambært OF eru avbjóðingar í skipan við fríðari umsiting, tí í fríðari sølu av veiðirættindi liggur tilfeingisrenta eftir hjá seljara, og er at meta sum øktur kostnaður hjá keypara. Við skipanum sum uppboðssølum ella tilfeingisgjaldi endar tilfeingisrentan í lands- ella kommunukassa, og harvið hjá borgaranum, ið er rætti eigari av tilfeinginum.

## Samanumtøka – Birgir Thór Runólfsson (BTR)

Eisini í Íslandi fevnur fiskiskapurin um bæði botnfiskiskap og pelagiskan fiskiskap. Botnfiskiskapurin í Íslandi minnir tó meiri um hann, vit kenna í Føroyum, har ið stórsti parturin verður fiskaður á landgrunni innan egið havøkið.

Tekur ein hædd fyri kapitalútreiðslum, var lønsemið hjá íslendska fiskiflotanum negativt øll árini í 70'unum í 80'unum, hetta hóast metstórt virksemi hesi árini. Síðani 1990 hevur lønsemið verið positivt og vaksandi, við fáum undantøkum.

Søguliga hevur íslendska fiskivinnan havt somu avbjóðingar sum í Føroyum og Noreg. Skiftandi stovnsmetingar hava havt við sær, at royndir vóru gjørdar við bólkakvotum, og síðani einstakar kvotur til fiskifør. Í 1984 var ein fyribilsskipan sett í verk við tíðaravmarkaðum umsetiligum kvotum; fyrst í eitt ár, og síðani 3 ár, men hesi loyvi vóru síðani gjørd varandi í 1991.

Í Íslandi hava miðvísar royndir veri framdar at skatta náttúrutilfeingi í fiskivinnu. Undan teimum átøkum, ið vóru framd eftir aldarskiftið, var skipan galdandi við einum sokallaðum menningargrunni, ið hevði til endamáls at keypa teir aktørar út, ið ikki høvdu ætlan um at halda fram í vinnuni.

Í ár 2004 var eitt lítið tilfeingisgjald sett á fiskiskapin. Eftir at fíggjarkreppan rakti var ein roynd gjørd at hækkað gjøldini, og ávísar broytingar vóru framdar í tíðarskeiðinum frá 2009 til 2013. Síðani 2013 hava íslendsku mynduleikarnir miðvíst roynt at lækkað hetta gjald. Felags fyri hesi gjøld er prísgrundarlagið, ið verður tikið frá avreiðingarprísinum árið fyri. Hetta tilfeingisgjald hevur í miðal givið um 400-450 mió. DKK í árligari inntøku til íslendsku felagskassarnar.

Sambært BTR skyldast íkomnað lønsemið í íslendsku fiskivinnuni eina og aleina skipanini við umsetiligum kvotum frá 1984. Hóast hendan skipan hevur verið undir støðugari mótstøðu, bæði frá búskaparfrøðingum og politikarum, metir BTR at ávísar villur eru í hesum kritikki.

Fyrst og fremst er tað ósatt, at lønsemi kemst av virði av tilfeinginum, tí hetta samsvarar ikki við væntandi lønsemið, tá ið virksemið var metstórt í tíðarskeiðinum 1978-84. Harafturat er tað ikki rætt, at lønsemi einans fellur kvotueigara til góðar, tí samfelagið fær sum mest burturúr við hesari skipan, bæði í tí stutta og langa høpinum.

Hetta kemst av at lønsemið kemur teimum, ið arbeiða í vinnuni til góðar, og harvið økjast skattainntøkurnar. Eftirspurningurin eftir vøru- og tænastu á landi økist, umframt at íløgutørvurin førir til stórt avlagt virksemi á landi. Eisini stimbrar ein sterk fiskivinna um íslendsku krónuna, og betraða býtislutfalli ger, at íslendarar fáa meiri burtur úr keypi av vøru og tænastu frá umheiminum.

BTR vísir á, at ástøði um tilfeingisrentu er grundað á eitt skeivt, fornaldarligt ástøði um búskaparrentu í landbúnaði. Hann vísir á, at hetta ástøði einans førdi til lægri lønsemi í landbúnaðarvinnuni, og metir tískil, at neyðugt er at førka seg burtur frá ástøðinum um búskaparrentu í tilfeingisvinnu sum heild.

Hann vísir eisini aftur, at tilfeingisgjald kunnu vera neutralir. Eru gjøldini ov høg, kann hetta vera viðvirkandi til at aktørar rýma úr vinnuni. Harumframt kunnu tilfeingisgjøld senda eitt skeivt signalvirði til framtíðar tilfeingisrentur, tí eingin vissa er at hesar vinnur sleppa undan slíkum gjøldum.

BTR leggur dent á, at gjøldini kunnu ávirka íløguáhugan, og harvið førleikamennan í vinnuni, umframt at trekkja kapital úr vinnugeiranum. Sambært honum er ein av stóru orsøkunum til økta lønsemið tann virðismenning, har íslendsku fyritøkurnar hava megnað at fleirfalda virðið á tilfeinginum við at gagnnýta allan fiskin, m.a. til kosmetiskar vørur, fiskamjøl og lýsi, heldur enn bara at nýta livur og flak, sum varð gjørt í 1960'unum og 1970'unum.

hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 2021 løgd til Landsbanka Føroya at røkja, og Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir lóg um Búskaparráð skal gerast tvær ferðir árliga; ávikavist tann 1. mars og 1. september.

# Útgangur

Tilfeingisrenta sæst í vinnum har eitt lutfalsliga stórt náttúrutilfeingi verður nýtt skynsamt av lutfalsliga fáum fyritøkum. Í Føroyum og Noreg sæst hetta við at yviskotini í alivinnuni er munandi størri enn í øðrum vinnum. Í Føroyum sæst hetta eisini við at yvirskotini í uppisjóvarvinnuni eru munandi størri enn í vinnum sum eru í kapping. Hetta eru tekin um at tilfeingisrenta er í hesum vinnum.

Av tí at stórur partur av yvirskotunum stava frá framíhjárættinum at nýta náttúrutilfeingi, ynskja almennir myndugleikar í Føroyum og Noreg at taka ein ávísan part av yvirskotinum inn aftur sum tilfeingisgjald.

Noreg hevur tilfeingisgjøld á oljuframleiðslu og framleiðslu av vatnorku, og Føroyar hava tilfeingisgjøld á pørtum av fiskivinnuni  og alivinnu. Ráðstevnan vísti, at flestu luttakararnir hildu tað vera búskaparliga rætt at hava tilfeingisgjøld, men at ein ávís ósemja var um, hvussu stór tilfeingisgjøldini eiga at vera, og hvussu tey skulu takast inn.

Føroyska alivinnan er saman við norsku alivinnuni í serflokki, har føroyska alivinnan hevur munin í løtuni. Tá so er, ber illa til at gera samanberingar við onnur fyri at læra og fáa íblástur. Í hesum føri muga Noreg og Føroyar allarhelst royna at taka við læru frá hvørjum øðrum.

Føroyingar hava arbeitt longst við at skipa so víðfevnd tøku- og tilfeingisgjøld. Gjøldini eru søguliga sæð sett í verk áðrenn grannar okkara, og upphæddirnar, ið eru tiknar inn til felagskassan eru lutfalsliga hægri enn hjá okkara grannunum.

Noreg hevur ikki tilfeingisgjald á fiskivinnuni, meðan tilfeingisgjaldið í Íslandi er bert ein brotpartur av tí, sum verður tikið inn í Føroyum. Fyrilestrahaldararnir rokna við, at Norra fer at seta í verk eina skipan við tilfeingisgjaldi, men ikki er greitt um íslendsku myndguleikarnir fara at hækka tilfeingisgjaldið. Ein avbjóðing í slíkari skipan sum tí íslendsku við fríari sølu av veiðirættindum er, at kapitaliseraða tilfeingisrentan liggur tá eftir hjá seljara og er at meta sum øktur kostnaður hjá keypara. Við skipanum, har tilfeingisrentan verður tikin inn, endar tilfeingisrentan í lands- ella kommunukassa, og harvið hjá borgaranum.

Ítøkiliga eygleiðingarnar í mun til føroysk viðurskifti vóru millum annað hesar:

Føroyska alivinnan er vaksin nógv síðstu árini, og føroyska alivinnan er í serflokki. Umhvørvisligu fortreytirnar at ala eru serstakliga góðar í Føroyum og harafturat settu almennu myndugleikarnir í Føroyum eftir kreppuna í alivinnuni í fyrst í 00'um strangar veterinerar reglur í verk. Hetta saman við dugnaligum alaranum og stórum íløgum hjá føroysku vinnuni hevur fingið alivinnuna at blóma. Eisini hevur altjóða alivinnan blóma sum heild, tá útboðið ikki hevur megna at fylgt við vaksandi eftirspurninginum. Føroysku alifyritøkurnar hava síðstu árini gjørt lutfalsliga størri íløgur í millum annað smoltstøðir, og merkir hetta, at laksurin gongur styttri í sjónum. Hetta er við til at minka um lívfrøðiligu avbjóðingarnar sum til dømis laksalús og sjúku. Alt hetta samlað ger at kiloprísurin fyri heilan føroyskan alilaks er tann hægsti í heiminum, áleið eina evru hægri enn heilur norskur alilaksur.

Neyðugt er framhaldandi við stórum íløgum fyri at hava tamarhald á sjúku og laksalús, fyri ikki at tosa um framhaldandi vøkstur í tøkunøgdum. Hartil skal havast í huga at krøv frá umhvørvisfelagsskapum viðføra enn størri íløgutørv í framtíðini.

Umráðandi er at seta saman avgjaldsskipanir, soleiðis at hesar ikki ávirka annars skilagóðar fíggjarligar avgerðir, ella beinleiðis eru viðvirkandi til suboptimering. Somuleiðis er umráðandi, at avgjaldsskipanin ikki førir til lægri íløgur, tí hetta hevur neiligar ávirkan á búskapin frameftir. Út frá hesum fyritreytum var eitt av tilmælunum at taka tilfeingisgjaldið á alivinnuna inn umvegis partafelagsskattin, við at hava ein hægri partafelagsskatt á alivinnuni. Mett verður í Noregi, at slík skipan hevði minst skeiklandi ávirkan á atburðin hjá alivinnuni, samstundis sum peningur verður tikin inn.

Óansæð val av skipan er tað umráðandi, at vinnan sum heild hevur støðugar karmar og veit, hvat vinnan hevur í væntu. Hetta ger seg serliga galdandi í kapitalintensivum vinnum sum fiskivinna og alivinna, har lutfalsliga stórur partur av virðisøkingini skyldast íløgum í framkomna tøkni og maskinur. Ein vinna við óstøðugum kørmum kastar ikki nóg nógv av sær, tí hon fremur ikki neyðugu íløgurnar við framtíðini í huga.

Nakað av kjakið var um hvørt talan er um tilfeingisrentu í alivinnuni ella talan er um aðra rentu, til dømis regulatiónsrentu. Tað varð ikki gjørt nógv burturúr hesum, og áhugin fyri hesum kjakið var allarhelst merktur av, at breið semja er um, at vinnan skal rinda tøku- og tilfeingisgjald.